

OLYMPISKUR GESTUR

*Sir Phil Craven saman við Egga Jensen, Johan Samuelsen og Jón á Steig, tá ÍSB í morgun skipaði fyri tíðindafundi*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# ÍSB fyllir 30 ár

**FØÐINGARDAGUR – Hesi árini hava verið fantastisk og ÍSB er blivið størri og betri, enn eg nakrantíð droymdi um, sigur formaðurin, Egga Jensen, sum eisini var við til at seta ÍSB á stovn**

Hilmar Jan Hansen

Í morgin eru 30 ár liðin, síðani ÍSB var sett á stovn, og í hesum sambandi hevur ÍSB boðið fleiri útlendskum gestum hendavegin, eitt nú formonnum og skrivarum úr hinum norðurlendsku sambondunum. Men fremsti gesturin, sum vitjar í Føroyum í sambandi við hátíðarhaldið, er uttan iva Sir Philip Craven, sum er forseti í IPC og nevndarlimur í IOC.

Umframt at vitja ÍSB, hevur hann hitt leiðsluna í Ítróttarsambandinum og hevur í dag fund við løgmann, Kaj Leo Johannesen. Fremsta málið á hesum fundum er føroyska umsóknin um olympiska viðurkenning, sum í fleiri áratíggju hevur ligið hjá altjóða olympisku nevndini, IOC, uttan tó at hava fingið játtandi viðgerð enn.

– Eg skilji væl, at hetta er eitt mál, ið upptekur tykkum nógv, men nú mugu tit ikki gloyma, at eg eri boðin hendavegin í sambandi við stóra dagin hjá ÍSB, sigur Sir Philip Craven.

– Eg eri ótrúliga glaður fyri at vera her, millum góðar vinir og eldhugað fólk. Áðrenn eg endaði í koyristóli, dámdi mær væl at ganga í náttúruni, og til tað endamálið kann eg ikki síggja fyri mær nakað vakrari enn tykkara land.

Ein annar týðandi gestur er forsetin í europeisku paralympisku nevndini, danskarin John Petterson, sum saman við hinum gestunum verður við til norðurlendska ráðstevnu í morgin og stóran veitsludøgurða í annaðkvøld.

## Gekk skjótt

Spírin til ÍSB kveiktist, tá Egga Jensen saman við donskum læraraskúlaítróttarlærarum í 1979 vitjaði Beitostølen Helsesportsenter í Norra, sum er uppvenjingarmiðstøð fyri brekað. Árið eftir fór hann aftur hagar saman við 28 læraraskúlalesandi, og heimafturkomin fór Egga saman við øðrum undir at seta á stovn ítróttarsamband fyri brekað. Hetta var gjørt í tøttum samstarvi við ÍSF.

– Hetta hava verið nøkur fantastisk ár, og og ÍSB er blivið størri og betri, enn eg nakrantíð droymdi um. Vit fingu beinanvegin norðurlendskan limaskap, og síðani hava vit fingið altjóða limaskap, har vit kunnu fáa tað, sigur Egga Jensen, sum er formaður ítróttarsambandinum fyri brekað.

– Fyrsta kappingarferðin uttanlands var í 1981 til Vestmannaoyggjarnar, og síðani hevur ÍSB verið við til bæði NM-, EM- og HM-kappingar, umframt til paralympiskar leikir, og allastaðni hava vit vunnið hópin av heiðursmerkjum hesi árini, serliga í svimjing.

*einslistir@kallnet.fo*

# Dupult galla

**GALLAVEITSLUR Bæði hondbólturin og flogbólturin hava sínar árligu gallaveitslur í annaðkvøld. Í báðum førum verður hæddarpunktið ímóti endanum á borðhaldinum, tá bestu spælararnir verða avdúkaðir**



GALLA

*Bæði hondbólts- og flogbóltsfólkini fara í annaðkvøld at taka sær av løttum eftir ein langan vetur í harðari kapping. Hondbóltsfólkini halda veitslu í Vestmanna og flogbóltsfólkini á Viðareiði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hilmar Jan Hansen

Gallaveitslan hjá hondbóltinum verður hesa ferð í Vestmanna, og hon byrjar í ítróttarhøllini klokkan 19, tá borðreitt verður við forrætti, høvuðsrætti og góðari desert fyri gallaklæddu spælarunum úr bæði Sunset- og Atlantic Airways-kappingunum, umframt øðrum, ið hava varðað av hondbóltinum í vetur.

Mest spennandi løtan, ið øll síggja fram til, kemur í endanum á borðhaldinum, tá avdúkað verður, hvørji skulu fáa heiður og steyp fyri at hava verið bestu spælarar og venjarar hjá kvinnum og monnum, umframt hvørjir hava verið bestu dómararnir í vetur. Rás 2 fer at senda beinleiðis úr Vestmanna frá klokkan 19 og úteftir.

Aftaná fara Jens Marni Hansen, Kim Hansen, James Olsen og Pauli Magnussen at spæla til dans undir heitinum »Gallaband«.

Eisini gallaveitslan hjá flogbóltinum byrjar klokkan 19, men hon verður á Hotel Norð á Viðareiði, har somuleiðis verður borðreitt við trimum rættum, umframt at góður dansur verður aftaná.

Og sum hjá hondbóltinum, verður stóra løtan á kvøldinum, tá ársins stjørnuskot, hevari, verjuspælari, álopsspælari, blokkur, venjari og ársins spælari hjá bæði kvinnum og monnum í Eik-ligunum í vetur skulu heiðrast við steypum og virðislønum.

*einslistir@kallnet.fo*